á skúlatrød

## Góðu næmingar og foreldur í 7. flokki – Á Skúlatrød, Viðareiði og Fossánesi.

Næmingar sum fara í 8. fl. á Skúlatrød eftir summarsteðgin, hava nú møguleika at velja vallærugreinar.

Á tímatalvuni eru 30 felagstímar. Umframt teir 30 felagstímarnar kunnu næmingarnir velja upp til 7 vallærugreinatímar. Hetta ber til at síggja og kunna seg nærri um at viðfesta leinkji, ið eisini liggur tøkt á heimasíðu skúlans www.skulatrod.fo.

Valið er frítt og tó:
*Týkst*
Fyri at sleppa á hugbreytini á gymnasialu miðnám skal næmingurin velja týkst og hava tað í 8. og 9.fl.

*Alis-evnafrøði*
Fyri at sleppa á nátturubreytini, tøknibreytini og tilfeingisbreytini skal næmingurin velja alis-/evnafrøði og hava tað í 8. og 9.fl.
Fyri at sleppa á yrkismiðnám (handverkaraúrbúgving) verður mælt til,
at næmingurin velur alis-/evnafrøði og hevur tað í 8. og 9.fl.

Tað ber eisini til at velja handaligar lærugreinar, um næmingurin ikki velur týkst.

Á https://www.les.fo ber tað til at fáa meiri kunning um víðari skúlagongd.

Tilmeldingarskjalið er sum nevnt at finna á heimasíðu skúlans.

Eru spurningar, ber tað til at seta seg í samband við skúlavegleiðararnar ella við leiðsluna á Skúlatrød.

Vinarliga
Tina Purkhús, skúlavegleiðari tlf. +298 228777
Bergljót Rond, skúlavegleiðari tlf +298 226979
Leivur Vitalis, deildarleiðari hádeild tlf +298 780206